# Røstin millum tað sum er okkara, og tað, ið kemur uttaneftir

**Seinnapartin sunnudagin í seinastu viku varð Bókadagurin hildin í Norðurlandahúsinum. Sum undanfarin ár stóðu Rithøvundafelagið og Norðurlandahúsið fyri tiltakinum. Á skránni var hin hevdbundni upplesturin -ur nýútkomnum verkum við einum tónlistarligum ískoyti frá Martini Joensen, sum sangir úr nýkomnu bóka- og fløguútgávu síni læt meg goyma teg**




*Carl Jóhan Jensen*

### Lars Saabye Christensen

Á hesum sinni var ein útlendskur gestur boðin á Bókadagin. Tað var norski rithøvundurin Lars Saabye Christensen, sum í 2002 fekk bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins fyri skaldsøguna Halvbroren. Lars Saabye Christensen hevur leingi verið sermerktur í bókmentaliga landslagnum í Noreg. Við sínum opinlynta, frumliga og lýriska skrivingarlag hevur hann evnað at vekja ans bæði hjá ungum og eldri, bæði hjá lærdum og hjá tí misjavna og tilvildarliga lesaranum, skrivar norski høvundurin Roy Jakobsen um hann í einari eftirskrift til eitt úrval av stuttsøgum, sum kom út í heyst. Harafturat er Lars Saabye Christensen helst ein av teimum fáu høvundum, norðurlendskum sum øðrum, ið hevur flest stílsløg á sínum valdi, alt frá lýrikki og stuttprosa, til smásøgur, leikritagerð, film og skaldsøgur. Síðani hann legði fyri við yrkingasavninum *Historien om Gly* í 1976 hevur Lars Saabye Christensen givið fleiri enn tretivu ymiskar bøkur, seinast skaldsøguna *Saabyes Cirkus*, sum nýliga er útkomin.

Í fyrilestri sínum, sum vardi ein góðan tíma, gav Lars Saabye Christensen áhoyrarunum innlit í tær innaru tilgongdir og ytri ávirkanir, sum fingu hann til tann høvund, ið m.a. hevur skapað slík stórverk sum eitt nú *Halvbroren*.

Hann lýsti umhvørvið í Oslo, uppvakstrarbýi sínum, har søgur hansara eru pallsettar, jørðildi, sum persónarnir hjá honum eru sprotnir úr og samvaksnir við. Hann tók fram tann týdning, sum tann nýmentan, ið trýssini komu við, hevði havt á skaldsligu og persónligu menning hansara, eitt nú rokkurin í trýssunum (serliga Beatles), men seinni eisini blúsurin. Blústónlistin, helt hann, bregdaði saman ljóð og lyrikk til eina óumberliga ímynd av grundkorunum hjá nýtíðarligum tilviti: einsemini.

Kortini helt hann ikki (eins og summir smærri profetar í samtíðini) lítið um arvmentir sínar, tað heimligu grundina í norskum máli, norskari bókmentahevd ella øðrvísi sagt í tí víðfevnda, men alsamt broytiliga sammedviti, ið á tværsagnakendan hátt skapar ta kensluna av eind í einum samfelagið, sum kann rópast upp á tjóðskap. Skapan (bókmentalig sum onnur) var, hóast umskiftiligar fyritreytir, kortini som í tí, at hon er og verður ein tvívegis tilgongd, ið sameinar tað, sum í hvørjum føri er okkara (umhvørvið, mál, hevd osfrv) við tað, sum uttaneftir kemur (eitt nú heimsbókmentirnar osfrv.)



*Lars Saabye Christensen*

### Pallborðsfundur um tjóðskap og bókmentir

Á Bókadagsskránni var eisini pallborðskjak við evninum: Tjóðskapur og bókmentir – fortreyt og/ella forðing? Hetta pallborðskjakið gjørdist heldur lingari enn evni kanska stóðu til og eyðkendist kanska einamest av tí, at ymiskt er um hugtakið tjóðskapur merkir tað sama í ymsum munnum.

Við pallborðið vildi onkur ikki bert kolldøma tjóðskapin, men sýntist eisini at halda, at føroyskt í sjálvum sær elvdi av sær ein hugburð, ið avbyrgdi føroyska samfelagið og serliga tey ungu frá tí flógva streymi av alheimsgerð, sum í hesum tíðum forðar øðrum tjóðum frá at frysta inni í nítjandualdarættaðum heimføðisskapi.

Tveir av pallborðsluttakarunum umrøddu hinvegin tjóðskapin og tjóðskaparrørsluna í søguligum ljósi og komu fram til, at hóast eina framskygda og ljósa byrjan, ið bar at frælsi, mentunarligum vøkstri og fólkaræði, hevði gongdin í tjóðskaparspurninginum kortini verið tann, at kvinnur í alsamt størri mun høvdu verið settar til viks og menn hevdað sær orðaskiftið um hann. Bæði soleiðis og sum stirðnað hugmynd um samfelagið kundi tjóðskapurin sigast at hava verið ein forðing.

Við pallborðið var harumframt víst á, at tann trúarliga víddin í tjóðskapinum, sum vil brúka úrvald brot úr bíbliuni sum evstu og avgerandi grundgeving fyri øllum, serliga kundi darva bókmentunum. Forsprákarar fyri hesum slagnum av tjóðskapi høvdu líkasum tvítryggjað seg móti allari ósmbærligari hugsan. Bar ikki til at kalla hana óføroyska, so bar til at skíra hana ókristiliga. Ella bæði í senn.

Pallborðsluttakararnir vóru tó allir á einum máli um, at tjóðskapur sum hugsjónarligt inntak og hvaðna minni sum tjóðskaparromantikkur hevði gjørt stórvegis vart við í føroyskum skaldskapi tey seinastu trýss, hálvfjers árini. Føroyskur skaldskapur (bæði bundin og óbundin) varð og verður sum heild eins og bókmentir í øðrum samfeløgum til í røstini, har tað sum er okkara, og tað, ið kemur uttaneftir møtast og brótast (te er um gávur og hegni yvirhøvur eru til at skapa nakað sum helst).

Soleiðis var (tak eitt nú føroysku kvæðini), soleiðis er og soleiðis fer at vera í framtíðini.

Eftir at henda niðurstøða var fingin, var orðaskiftið eitt sindur á reikum higar og hagar, onkuntíð í nánd við, men oftast burturfrá evninum.

Og helst mundi áhoyrarin í salinum hava allan rættin, sum at enda reistist og segði, at hetta var kjak upp á kvamsvís ella sum hann málbar seg:

eitt pseudokjak í einum pseudo-samfelagi.



*Kim Simonsen, Carl Jóhan Jensen, Turið Sigurðardóttir, Rói Patursson og Ivan Niclasen*